Felagið Føroysk Ross

Vatnsoyrar, 8. novembur 2021

**Viðmerkingar til svarið hjá Magnusi Rasmussen, landsstýrismanni, upp á § 52a-fyrispurning nr. 52-069/2021 frá Bjørt Samuelsen, løgtingsmanni, um átøk at bjarga og varðveita føroyska rossastovnin.**

*Spurningarnir frá Bjørt vóru soljóðandi:*
*1. Hvat krevst av lógarbroytingum, fyri at føroysk ross kunnu útflytast?*
*2. Hvørjar lógarbroytingar skulu gerast, fyri at føroysk ross kunnu verða skrásett á góðkendan hátt og ein myndugleiki ella felag fáa heimild at vátta upplýsingarnar í rossapassum?*
*3. Ætlar landsstýrismaðurin at fáa hesa lóggávu gjørda og um ja, nær kann tað væntast?*
*4. Ætlar landsstýrismaðurin at hækka játtanina til stuðul til at varðveita føroyska rossið?*
*5. Ætlar landsstýrismaðurin at gera ein miðvísan alipolitikk fyri at tryggja framtíðina hjá føroyska rossastovninum?*

Fyrst av øllum vilja vit í nevndini hjá Felagnum Føroysk Ross takka Magnusi Rasmussen og Bjørt Samuelsen fyri at vísa føroyska rossinum ans, og geva sær stundir at viðgera málið.

Í svari sínum sigur Magnus, at Umhvørvis- og vinnumálaráðið saman við Heilsufrøðiligu starvsstovuni er farið undir at fyrireika neyðugar lógarbroytingar, so føroysk ross kunnu útflytast. Hetta eru vit í Felagnum Føroysk Ross sera fegin um. Magnus nevnir tó eisini í svarinum til nr. 1-3, at talan er um rúgvusmikið arbeiði, ið væntandi fer at taka drúgva tíð, og at

> ”Umhvørvis- og vinnumálaráðið er farið undir at fyrireika omanfyri nevndu lóggávu, men fyrst og fremst krevst, at Heilsufrøðiliga starvsstovan fær umstøður at kanna og nágreina veterinerfakligu treytirnar, sum skulu vera loknar, áðrenn farast kann undir at gera neyðugu lóggávuna. Heilsufrøðiliga starvsstovan metir í hesum sambandi, at tað er neyðugt at seta ein embætisdjóralækna at arbeiða við hesum, og at arbeiðið væntandi tekur eitt ár. Eingin játtan er til hetta í løtuni”.

Nevndin í Felagnum Føroysk Ross vil við hesum gera vart við, at Bárður Enni, stjóri á Heilsufrøðiligu starvsstovuni, tann 19. februar 2018 skrivaði í einum teldubrævi til Pól Edvard Egholm og Joannu Djurhuus, at

> ”ofta hanga vit *(t.e. HFS)* uppá slíkt arbeiði í 2 ár eftir at FVO vitjanin hevur verið”

og

> ”alt í alt er ein normering á minst 700 tkr/ár til hetta. Fáa vit hesa játtan, kann arbeiðið gerast, treytað av at tað er umfatað av avtaluni við ES”. Sí fylgiskjal 17-00432.

Tað er av alstórum týdningi, at ein nøktandi játtan verður sett av til hetta arbeiðið beinanvegin. Hóast talan er um rúgvusmikið arbeiði, ið tekur tíð, so er fyrst og fremst talan um raðfesting. Felagið hevur savnað undirskriftir frá fleiri serfrøðingum, fakfólki, alarum og áhugafólki, og við hesum undirskriftum verður víst á, at málið skal fáa hægstu raðfesting og tolir ikki at verða drýggjað. Vit vilja, at fólkið verður hoyrt, og at síggja munagóð átøk í málinum um varðveiting av føroyska rossinum beinanvegin. **Ein nøktandi játtan til hetta mál má setast av beinanvegin.**

Eisini sigur Magnus í svari sínum til 1-3, at "síðani er neyðugt at fáa til vega lóggávu, sum heimilar Heilsufrøðiligu starvsstovuni at góðkenna og hava eftirlit við feløgum, sum skráseta ross. Tað er ein treyt fyri at útflyta føroysk ross, at rossini eru skrásett, og helst er tað eisini ein treyt, at skrásetingin fevnir um øll ross í Føroyum, eisini onnur rossasløg enn føroyska rossið. Treytirnar fyri at góðkenna eitt felag til at skráseta ross, eru m.a., at talan skal vera um ein løgfrøðiligan persón, at felagið skal prógva, at tað hevur eftirlit við ættarbókum (stambog), at felagið hevur góðkenda skrásetingarskipan og eyðmerkingarskipan, og at nóg nógv djór eru til at varðveita ættarslagið".

Vit vilja her gera vart við, at skrásetingarskipanin hjá føroyska rossinum, Føroya Fongur, lýkur ES-krøv. Føroyska rossið manglar tó eitt UELN-nummar, sum er krav sambært ES-lóggávu. Fyri at føroyska rossið kann fáa eitt UELN-nummar, so mugu myndugleikarnir í Føroyum fyrst góðkenna ein skikkaðan skrásetingarmyndugleika til føroyska rossið, sum síðani kann søkja um UELN-nummarið. Felagið Føroysk Ross ynskir, at Føroya Fongur verður góðkendur av landsins myndugleikum. Tað er ikki nøkur treyt, at skrásetingin fevnir um øll ross í Føroyum. Sambært ES-lóggávu, so skal hvørt einstakt rossaslag hava sína egnu skrásetingarskipan og aliætlan. Onnur reinald rossasløg í Føroyum eru longu fevnd av øðrum skrásetingarskipanum t.d. er skrásetingarskipanin *Worldfengur* fyri íslendska rossið.
Vit vilja eisini vísa á, at í teldupostbrævinum hjá Bárði Enni, stjóra á Heilsufrøðiligu starvsstovuni, til Pól Edvard Egholm og Joannu Djurhuus tann 19. februar 2018 stendur skrivað, at "ES regluverkið um góðkenning av skráseting av rossum loyvir ikki at gera mun, HFS hevur skyldu at viðgera umsóknir frá øllum, sum ynskja tað". Sí fylgiskjøl 17-00432 og CELEX_32016R1012_EN_TXT.
Á fundi tann 25. juni 2020, sum Felagið Føroysk Ross hevði við Helga Abrahamsen, táverandi landstýrismann í Umhvørvis- og vinnumálum, varð víst á, at Felagið Føroysk Ross vildi vera góðkent sum ali- og skrásetingarfelag, og víst var á tær ES-reglur, sum eru galdandi hesum viðvíkjandi, og manglandi lóggávu í Føroyum. Hóast Umhvørvis- og vinnumálaráðið segðist fara at heita á Heilsufrøðiligu starvsstovuna um at lýsa lóggávupartin nærri, so hilling fæst á, hvussu drúgført arbeiðið verður, spurdist einki meira burturúr hesum. Sí fylgiskjal 20-00459-2.

Magnus sigur eisini í svarinum til nr. 1-3, at "Í fyrsta lagi er neyðugt at fáa føroyska rossið góðkent sum serligt rossaslag. Slík góðkenning krevur ávíst tal av djórum, alt eftir býtinum millum ryssur og hestar. Føroysku rossini eru fá í tali, og spurningurin er, um stovnurin er nóg stórur at verða góðkendur. Hetta verður kannað í løtuni.

Her vilja vit gera vart við, at í ES-lóggávu*"REGULATION (EU) 2016/1012 OF THE EUROPEAN PARLIAMENT AND OF THE COUNCIL of 8 June 2016 on zootechnical and*

*genealogical conditions for the breeding, trade in and entry into the Union of purebred breeding animals, hybrid breeding pigs and the germinal products thereof and amending Regulation (EU) No 652/2014, Council Directives 89/608/EEC and 90/425/EEC and repealing certain acts in the area of animal breeding (‘Animal Breeding Regulation’)”* stendur skrivað undir stk. (27): Because the preservation of endangered breeds requires the setting up and recognition of breed societies with a limited number of breeding animals participating in their breeding programmes, the size of the breeding population should not, in general, be considered to be an essential requirement for the recognition of breed societies managing endangered breeds or for the approval of their breeding programmes, particularly since the recognition is carried out nationally.
Hetta merkir, at hóast talan er um avmarkaða mongd av lívdjórum í føroyska rossastovninum, so kunnu vit sambært ES-lóggávu fáa ein skikkaðan skrásetingarmyndugleika í Føroyum fyri føroyska rossið, og við hesum vilja vit enn og aftur leggja dent á, at spurningur er um raðfesting av málinum, og eina hægri játtan til hetta mál.

Til spurningarnar nr. 4-5 hjá Bjørt svarar Magnus, at ”Í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2022 verður skotið upp at varðveita játtanina upp á 300 tús. kr. til Føroysk húsdjór. Hetta er sama upphædd sum í 2021. Játtanin er ætlað til alidjór og til verkætlanir við føroyskum húsdjórum og kann tí eisini brúkast til tiltøk, føroyska rossinum at frama. Afturat hesum er í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2021 ein játtan upp á 100 tús. kr. til Felagið Føroysk Ross. Játtanin, sum verður latin sum ein stuðulsjáttan, er ætlað til aling og skráseting av føroyskum rossum”.
Nevndin í Felagnum Føroysk Ross vil við hesum vísa okkara stóra takksemi fyri játtanina á 100 tús. kr., ið eru oyramerktar til felagið. Felagið hevur fingið sera nógv burtur úr hesi játtan, og hvørt eitt oyra er farið beinleiðis í varðveiting av føroyska rossinum og skásetingarskipanina Føroya Fongur. Alt arbeiðið, felagið ger, er sjálvboðið. Var tað ikki fyri hesum arbeiði, sum felagið hevur gjørt, og sum enn verður gjørt, so var einki føroyskt ross til í dag og ei heldur nøkur skráseting/ættartalva. Øll rossini verða DNA-kannaði, merkt við microchip og skrásett. Harafturat hevur felagið fingið gjørt kanningar um innannøring í stovninum, kannað ílegur og fingið eina aliætlan, ið er sersniðgivið til føroyska rossið og tørvin í einum sera hóttum rossastovni. Føroya Fongur er ein hágóðsku skrásetingarskipan, ið lýkur ES-krøv, og er klár at virka altjóða.
Vit kunnu tó viðmerkja, at felagið hevur søkt um hægri játtan, so felagið kann røkka enn longur, og vóna vit vælvild í tí málinum.

Magnus nevnir eisini í sínum svari til nr. 4-5, at ”Búnaðarstovan hevur sum part av uppgávuni at varðveita føroysk húsdjór keypt trý føroysk ross. Rossini skulu brúkast til kynbótaarbeiði. Tørvur er á at betra korini hjá rossunum, sum húsast á Búnaðarstovuni, og tí eru í fyrstu atløgu 250 tús. kr. raðfestar til hetta arbeiðið í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2022. Ætlanin er at seta eitt fólk parttíð at taka sær serliga av føroysku rossunum”.
Vit vilja her gera vart við, at hesar upplýsingar ikki eru rættar. Tað er gott at játtanin verður hækkað, men Búnaðarstovan eigur 7 aliross, og ikki 3. Hon eigur 5 greðingar og 2 ryssur. Einans eitt av hesum rossunum var virkið í alingini í ár – ein greðingur. Tað var ein limur í Felagnum Føroysk Ross, sum fekk greðingin til sína ryssu, og tað var Felagið Føroysk Ross,

ið var ráðgevi fyri paringini, sum samsvarar aliætlanini fyri føroyska rossið. Felagið hevur, sum sagt, tikið sær av øllum ali- og skrásetingararbeiði alla tíðina. Harafturat skal nevnast, at eftir tilráðing frá fleiri serfrøðingum er ikki ráðiligt at kynbøta føroyska rossið enn, tí okkara fremsta mál er at halda innannøringini niðri, samstundis sum vit stremba eftir, at allar ílegurnar berast víðari, fyri at varðveita lívfrøðiliga margfeldið. At kynbøta er at velja nakrar eginleikar til og velja aðrar frá. Kynbót hevur við sær, at mann fær fleiri av ávísum útvaldum ílegum, men at mann samstundis eisini missir fleiri ílegur og harvið fækkast lívfrøðiliga margfeldi. Tískil er kynbót als ikki í tráð við tey tilmæli, vit hava frá serfrøðingum um føroyska rossið, har øll rossini skulu hava virði í alingini og lívfrøðiliga margfeldi raðfestast. Áður høvdu vit føroysku kúnna, sum gekk í haganum hvørt summar. Kúgvin var lítil og treyst. Hon mjólkaði tó ikki eins nógv sum t.d. norsku sløgini, og tí var farið undir at kynbøta føroysku kúnna, so hon gav meiri mjólk. Úrslitið varð, at føroyska kúgvin doyði út, og at smábøndur í dag kunnu ikki hava eina kúgv til egna matframleiðslu, tí lendið og umstøðurnar í Føroyum eru ikki egnaðar til størra neytaslagið. Fara vit at kynbøta føroyska rossið longu nú, so avmarka vit lívfrøðiliga margfeldi, og fara at missa ílegur, sum aldrin kunnu fáast aftur.
Verandi játtan er 150 tús. kr. til føroysk alidjór. Skilagott hevði verið at hækka ta játtanina, og oyramerkt ein nøktandi part av henni til føroysk aliross. Verður játtanin hækkað og oyramerkt til aliross, so verða korini betri at økja um stovnin av føroyskum rossum í Føroyum. Sí fylgiskjalið við tilmælunum frá táverandi stjóra á Búnaðarstovuni Bjørn Patursson frá 2011. Leggjast kann afturat, at felagið metir tað vera av størsta týdningi, at arbeiðsuppgávurnar verða rætt raðfestar og lutaðar millum ymisku partarnar. Um Búnaðarstovan skal vera ein vælvirkandi greðingamiðstøð, so skal hon hava munandi hægri játtan fyri at røkja tað arbeiðið væl. Hugskotið um eina greðingamiðstøð í Føroyum er gott, men tað má fremjast rætt og skilagott. At ein almennur stovnur skal hava 250 tús. kr. til røkta 3 av sínum 7 rossum man vera ein ivasom raðfesting av peningi, sum á slíkum almennum stovni hevði verið gagnligari nýttur til sáðtøku, sáðgoymslu, ílegukanningar og aðrar náttúrufrøðiligar kanningar.

Eisini nevnir Magnus í sínum svari til nr. 4-5, at ”sambært FAO skal talið av aliryssum upp um 1000, skal stovnurin ikki vera hóttur”.
Vit vilja her gera vart við, at hesar upplýsingar eru ikki dagførdar. Nýggjastu tølini hjá FAO siga, at talið av aliryssum skal upp um 3000, skal stovnurin ikki vera hóttur.

Magnus nevnir, at Føroya Løgting hevur tikið undir við sáttmálanum um lívfrøðiligt margfeldi *(The Convention on Biological Diversity)*, og við hesum eru Føroyar bundnar at tryggja lívfrøðiligt margfeldi.
Her vilja vit gera vart við, at í ES-lóggávu stendur skrivað: *“Breed societies and breeding operations recognised in one Member State should have the possibility to implement their approved breeding programme in one or more other Member States in order to ensure the best possible use, within the Union, of breeding animals of high genetic value”*, og *“Cross-border cooperation between breed societies and between breeding operations which wish to engage therein should be facilitated, while ensuring free entrepreneurship and the removal of obstacles to the free movement of breeding animals and their germinal products”*. Sí fylgiskjal CELEX_32016R1012_EN_TXT. Hetta undirstrikar týdningin av, at samarbeiðið millum lond í alingini av føroyska rossinum er umráðandi til varðveiting av lívfrøðiligum margfeldi, og

serliga tá føroysku umstøðurnar eru so avmarkaðar, sum tær eru. Vit kunnu ikki loyva okkum at hava rossið fyri okkum sjálvi, og hartil spakuliga tynna tað ílegumargfeldi, sum enn er í stovninum, sum eru avleiðingarnar nú, vit ikki fáa alt og økt um stovnin í Føroyum.

At enda sigur Magnus, at ”arbeitt verður sum nevnt við málinum, men ilt er at siga, nær komið verður á mál. Í øllum førum er greitt, at munagóð átøk í longdini mugu setast í verk. Hvørji hesi skulu vera, ber ikki til at siga neyvt í løtuni, og í fyrstu syftu verður tí arbeitt við at fáa til vega neyðugu reglurnar fyri at útflyta føroysk ross”.

Vit í Felagnum Føroysk Ross vilja undirstrika týdningin av, at tað als ikki er nøktandi, at mann hvørki hevur eina landsgóðkenda varðveitingarætlan, og ei heldur eina landsgóðkenda skrásetingarskipan ella skrásetingarmyndugleika. Felagið hevur víst á, hvør støðan er, hvat skal til og at fleiri serfrøðingar hava skrivað undir eitt skjal, at munagóð átøk mugu gerast beinanvegin. Tað er spurningur um raðfesting. Gongd má koma á málið beinanvegin, skal føroyska rossið varðveitast. Fyrsta stigið er at seta eina játtan av, sum tryggjar, at tað arbeiðið verður gjørt, sum skal til.

**Nevndin**
Felagið Føroysk Ross